# Bilmekanikari

Søkt verður eftir bilmekanikara til verkstað okkara, at byrja beinan vegin.

Vit vænta, at umsøkjarin er ágrýtin, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir at arbeiða við teldu á brúkara støði.

Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur kunnleika til CAN-BUS.

Skrivlig umsókn og prógv skulu sendast til:

**P/f Bilasølan**
Boks 3192
FO-110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Øssur á tlf. 315354

**Bilasølan**
**Vegurin langi, 315354**

# Lívbjargari

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið 1 starv sum lívbjargari við svimjihøllina í Fuglafjarðar skúla leyst til setan tann 23. august 2004. Talan er um kvinnuligan lívbjargara.

Arbeiðstíðin verður 13 tímar um vikuna hjá hvørjum.

Lønin verður ásett sambært sáttmálan millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu verða fingin til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 í vanligari avgreiðslutíð máandag til fríggjadag.

Møguligar umsóknir skulu vera Fuglafjarðar býráð í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. august 2004 kl. 15.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, 8. juli 2004

**Fuglafjarðar býráð**

# Honda Accord til sølu

árg. 2001, koyrt 47.000 km, til sølu fyri 150.000 kr.

Bilurin er í sera góðum standi.

**Tlf. 282133/318771**

**Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**Til Orientering:**

## Kommunulækni 3

Christian Maschmann
Klaksvíksvegur 57
Telefon: 45 50 45

Er nu godkendt til at udfylde
**Heilsuprógv fyri sjófolk** (Blá Bok).

| Åbningstider: | Telefontid | Konsultation |
|---|---|---|
| Mandag: | 08.30-09.30 | 10.00–15.00 |
| Tirsdag: | 08.30-09.30 | 10.00–15.00 |
| *Onsdag:* | *12.00-13.00* | *13.00–18.00* |
| Torsdag: | 08.30-09.30 | 10.00–15.00 |
| Fredag: | 08.30-09.30 | 10.00–15.00 |

**Tidsbestilling og receptfornyelse:** 9.30–15.00
Onsdag: 13.00–17.00

NB! Ferielukket fra 20.08 – 02.09.04

Alle patienter og samarbejdspartnere ønskes en god sommer!

# Skrivstova/Bókhald

Hálvtíðarstarv – 22½ tímar/viku

Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovu okkara á Toftum at byrja skjótast tilber. Starvið er ætlað sum eitt 'systur'-starv til eitt verandi ½-tíðar starv, soleiðis, at skrivstovan er mannað 45 tímar um vikuna.

Arbeiðið fevnur um telefon-kundarøkt, bókhald og annað skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar skulu hava útbúgving innan handil, bókhald ella tilsvarandi. Eisini royndir við teldum, bókhaldsskipanum og skrivstovuarbeiði geva fyrimun.
Álit, nærlagni, góð samstarvsevni og arbeiðsemi verður sett í hásætið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kára í Garði, stjóra,
T-post: kari@kassi.fo
Telefon: 449952 / 219952

Umsóknarfreistin er 10. august. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsókn við C.V. og prógvum skal sendast til:

**Miðstøðin P/F**
Att: Kári í Garði, stjóri
Bryggjan
FO-650 Toftir

Miðstøðin P/F er eitt 9 ára gamalt partafelag, íð veitir tænastur til fiskivinnuna. Vit hava í miðal 7 ársverk umframt undirveitarar. Miðstøðin hevur høvuðsgoymslu og skrivstovu á Toftum. Á skrivstovuni starvast 3 fólk.
Á skrivstovuni arbeiða vit við
Navision Atain
HeimaBanka
MS Office
TRM Total view

# LFA Landsfelagið fyri fólk við autismu

**Skeið fyri foreldur og systkin at børnum við autismu ella Asperger Syndromi á Hotel Lonini á Eiði**

Lennart Pedersen, fakligur leiðari og sálarfrøðingur á Center for Autisme kemur til Føroyar at hava eitt vistarskeið fyri foreldrum og systkjum at børnum við autismu ella Asperger Syndromi saman við føroyskum fak- og hjálparfólkum.

Endamálið við skeiðnum er at geva **systkjum** at børnum við autismu ella Asperger Syndromi høvi at tosa saman um sínar royndir og kenslur undir serkønari vegleiðing. Samstundis fáa **foreldrini** undirvísing um, hvussu tey best taka sær av fullføru systkjunum í hesi truplu uppgávu.

Skeiðið verður hildið á Hotel Lonini á Eiði frá fríggjakvøldinum 10. sept. til sunnudagin 12. sept. seinnapartin.

Møguleiki er at søkja stuðul.

Talið av luttakaraum er avmarkað, og síðsta freist at tekna seg er fríggjadagin 27. august 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til tlf. 442031, 509031 ella 441269, aftan á kl 18.00.

**LFA Landsfelagið fyri fólk við autismu**

# Starvsfólk/ pedagogur til Rókina

Á Rókini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum, er 1 fulltíðarstarv leyst at søkja til 1. sept. 04 ella eftir nærri avtalu.

Rókin er ein landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at viðkomandi, ið settur verður, er førur fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði vaksin og børn og er opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi útbúgving/royndir og verður løntur eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Neyðugt er at tú hevur koyrikort.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 22. august 2004.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen, leiðara, á tlf. 318914 / 213044.

**Rókin**
Garðsgøta 31 · 160 Argir



# Stuðulsfólk í Runavíkar kommunuskúla

Fyri stuðulsfólk í farloyvi er til skúlaárið 2004/2005 eitt starv leyst í Runavíkar skúla.

Arbeitt verður við fjølbrekaðum næmingum 25 tímar um vikuna. Fyrimun hevur umsøkjari við sjúkrarøktarførleika. Løn eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsókn við avriti av próvskjølum v.m. skal vera Runavíkar skúlastýri v/ Malan Rasmussen, Niðari vegur, 660 Søldarfjørð í hendi í seinasta lagi tann 10. august 2004.

Nærri upplýsingar kunnu fáast hjá Duritu P. Joensen, tlf. 449975 ella Malan Rasmussen tlf. 441842.

**Runavíkar Skúlastýri**
v/ Maluni Rasmussen

# 2 HARLEY DAVIDSON TIL SØLU



År 2002 Sportster XL 883 Custom, blá metallic 5000 Km.
**nú Kr. 125.000,-**

År 2004 Softail Twin cam-B. injektion, sølv metallic 0 Km
**Kr. 285.000,-**

FÁ MEIRA AT VITA Á WWW.HD.FO OG TEL 21 04 05

**HD.FO**
J. Broncksgøta 33 · 100 Tórshavn

**STOP DREAMING, START RIDING...**

# OPEL ASTRA 1600 TIL SØLU



Árg. 97 - Km 85.000
Bilurin er ógvuliga snotuligur og sera økonomiskur í brúki.
Til sølu vegna flyting

Prísuppskot kr. 65.000,-

Áhugaði vinarliga ringi á tel. 252825

Sosialurin 341800

**FA. GRAVSTEINAR**




Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰–17⁰⁰
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!

**Sosialurin**
Veðrið · Bilar · Lýsingar · Tíðindi · Viðmerkingar · Ítróttur · Tiltøk · Nøvn · Skrá

# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

**Tráðleysar**

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

**Til skip og bátar**

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

# Bygningur í miðbýnum til leigu



Tygum kunnu seta tygum í samband við undirritaða á tlf. 317920 ella 313536.

**Høgni Lützen**
**P/F Valdemar Lützen**

**Lesið Sosialin**

KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini



WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

*"Kjálkar, lippur, ræstur fiskur, upsastykkir við barbequesmakki ....fyrsta floks delikatessur!"*

***- fisk til døgurða minst eina ferð um vikuna!***

**www.fiskakeyp.fo**

Á heimasíðu okkara finnur tú eitt stórt úrval av fiski og fiskaúrdráttum til matna. Og har finnur tú eisini døgurðauppskriftina!

Bíleggingarlisti liggur á heimasíðuni. Fyll út og send/faxa til okkara, so hevur tú vøruna við dyrnar 2-3 verkadagar aftaná. Tú kanst eisini ringja ordran inn á tlf. 21 53 35. Skjótt og ómakaleyst.

**Sonni FISKAKEYP**
690 Oyndarfjørður
Tlf. 21 53 35
Fax 44 52 45

***- tín fiskaveitari á alnótini***